# ALDUDALINUM



## 1800 ARBEIÐSLEYS

Í løtuni eru einir 1800 føroyingar arbeiðsleysir. Tað vísa tey nýggjastu tølini hjá ALS.

Ernst Jacobsen, stjóri í ALS, staðfestir, at tey klára ikki at skráseta umsóknir um arbeiðsloysi, so hvørt tær koma inn, men tilsamans er talan um eini 1800 fólk, sum nú eru í skipanini, ella gott og væl tað.

Hetta er eitt sindur lægri enn tað var fyri heilt stuttum, tí tá táttaði talið upp ímóti 2000 arbeiðsleysum.

Men eisini stjórin í ALS heldur, at ábendingar eru um, at støðan er við at batna, tí seinastu tíðina hevur eitt fitt tal av fólki meldað seg úr skipanini, tí tey hava fingið arbeiði, bæði í sambandi við at leingja flogvøllin, Faroe Pelagic í Kollafirði, Kósina í Klaksvík og aðrastaðni.

Men tað eru eisini fyrispurningar frá stovnum, virkjum og fyritøkum, sum sóknast eftir avloysarum í summar og tað er eisini ein ábending um, at tað gongur rætta vegin.

Ernst Jacobsen hevur eisini nýliga verið á skeiði í Noregi og har var ein greið fatan um, at búskaparliga gongdin var í batningi í Noregi og at framgongd er aftur at hóma.

Samstundis vísa nýggjastu tølini frá fíggjarmálaráðnum, at lønarútgjeldingarnar fyrstu fýra mánaðirnar í ár eru 3,6% hægri enn í sama tíðarskeiði í fjør.

Stjórin í ALS sigur, at ein partur av forkláringini er, at útgjaldið úr ALS er hækkað.

– Men tað er verri enn so øll forkláringin, tí tað er eisini talan um ein veruligan vøkstur í løntum arbeiði, leggur hann dent á.

**FRAMGONGD**

*Tað eru avgjørt tekin um, at búskaparliga gongdin er við at venda og at tíðirnar fara at batna aftur, men árið í ár kann gott ganga, áðrenn framburðurin bítur seg fastan her hjá okkum, sigur Jan Otto Holm, fíggjarráðgevari*

Mynd: Jens Kristian Vang